# Krevja svar frá Hans Paula

**Landsfelagið fyri fólk við Autismu**

Í summar mótmælti *Landsfelagið fyri fólk við autismu,* at 1 mió. var tikin av játtan til umlættingarheim í Klaksvík til børn við autismu. Henda milliónin var tikin, tí játtanin á øðrum økjum ikki rakk.

Í sambandi við mótmælið hevði blaðkvinna á Dimmalætting í blaðnum 8/8-2005 samrøðu við Hans Paula Strøm, landsstýrismann. Har varð ført fram, at játtanin ikki var ætlað til nýtt umlættingarheim, men til økta umlætting, ið skuldi byrja 1. oktober, og at 1 mió var eftir, ið røkkur til hetta víðkaða virksemið.

Tilboðini, ið skuldu verða víðkað frá 1. oktober, eru:

- Nøkur búpláss til fólk yvir 18 ár við autismu
- og væl fleiri umlætttingarpláss.

Tá 1. oktober reiðiliga var farin afturum, uttan at felagið hevði fingið nakra ábending um, at nøkur økt umlætting er í umbúna, sendi *Landsfelagið fyri fólk við autismu* tann 10. nov. Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, bræv, har spurt verður:

- Hvussu nógv hava fingið boðið umlætting
- Hvussu nógv fólk yvir 18 ár við autismu hava fingið búpláss?
- Og hvør stovnur røkir hesi nýggju tilboðini?

Hóast ein mánaður er liðin, hevur felagið onki svar fingið - og onga ábending um nakra økta umlætting.

Landsfelagið má tí staðiliga gera vart við, at

- tørvur er framvegis á nýggjum umlættingarheimi til børn við autismu,
- tørvur er framvegis á øktari umlætting og búplássum.

*Landsfelagið fyri fólk við autismu* vónar framvegis at fáa eina frágreiðing, um ella nær nevndu tilboð verða sett í verk, ella hvat varð av tí milliónini, ið eftir var.

# Kvinnur og kvæði í Mettustovu

**Mánakvøldið 28. januar kl. 20 heldur Malan Marnersdóttir, professari í bókmentum, fyrilestur um kvinnur og kvæði**

**FYRILESTUR**
*tíðindaskriv*

Talan er sum sama fyrilestur, sum Malan helt á Tvøroyri fyrr í mánaðnum, men nú fáa so vit havnarfólk møguleikan.

Fyrilesturin viðger repertoirið hjá trimum vágskonum. Tær eru Birita á Mýri, Anna Sofía á Skála og Kristianna Schröder, sum allar livdu í 19. øld. Birita og Anna Sofía kvóðu fyri V.U. Hammershaimb, meðan Kristianna sjálv skrivaði síni kvæði upp. Forvitnisligt er at vita, um hesar kvinnur serliga hava lagt seg eftir at duga kvæði, sum lýsa kvinnulagnur og kvinnumentan, ella um tað eru tey vanligu kappakvæðini.

# Nýtt Ð á gøtuni




Jólaútgávan av Ð er nú komið á handilshillarnar í Føroyum. Hesa ferð hava teir á Ð eina samrøðu við Høgna Hoydal og Pipar & Salt menninar.

Jólatema og Biltema er eisini á skránni saman við massar av Hollywoodstjørnum. Og so er sjálvandi eisini talan um nógvar myndir. Hesa ferð eru tað tvíburasystrarnar Maria & Kristina, sum prýða forsíðuna á blaðnum.

Ð er hesa ferð 60 síður til støddar. Blaðið fæst í sølubúðum kring landið og kostar 49,95.

**-mørk**

# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Daisy Petersen*
*Skinnstakkurin 7*
*530 Fuglafjørður*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: SUNNUDAGUR

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| S | Y | Ð | R | A | D | A | L | S | S | K | A | R | Ð | | K |
| Ø | L | | E | Z | R | A | | Ó | T | U | | A | | G | O |
| G | U | R | U | | U | | K | L | A | T | T | U | R | | R |
| U | R | | M | A | M | M | A | | K | | E | | Á | S | T |
| H | | N | E | B | B | A | F | I | S | K | A | R | | P | I |
| Á | | I | R | | U | L | F | | Á | R | | O | M | A | N |
| T | A | N | T | U | R | | I | N | F | O | R | M | E | R | I |
| T | I | N | | N | | | V | | O | P | N | A | S | T | |
| U | R | | | D | I | N | O | | S | O | | | T | A | L |
| R | | N | O | R | N | A | G | E | S | T | U | R | | | E |
| | L | Ø | T | A | N | | N | U | U | K | | Ó | S | I | N |
| V | E | R | A | | | H | U | R | R | I | K | A | N | N | A |
| I | V | I | | D | U | E | R | O | | N | Ý | R | A | | |
| T | I | N | N | U | | G | | P | I | | R | | T | Á | M |
| U | N | G | | K | U | R | P | A | L | I | | N | I | K | E |
| G | T | | M | E | L | I | S | | T | V | I | N | N | I | R |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysnarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**Loysunarorðið:** ............................................ **445**

Navn: ...............................................................

Bústaður: .......................................................

Bygd/býur: ......................................................

## *Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!*

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** - *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar - bæði innan og uttan skúlagátt***